# uslimar í Birmingham



*Nógv fólk støðga á og koma yvir til bókaborðið og fáa eina samrøðu í lag við OM-fólkini. Her er Høgni Johannesen í essinum - í orðaskifti við ein muslim, sum opið og erligt viðgekk, at um Ongland bleiv muslimskt, skuldu tey kristnu gjalda fyri at vera á livi ella bøta við lívinum*



*At koma til Alum Rock býarpartin er sum at koma til eitt arabiskt land. So gott sum allir íbúgvarnir eru asiatar, og býarparturin er merktur av teirra mentan*



*Høgni Johannesen úr Havn og Cicel Charles úr Pakistan arbeiða fyri OM-Luke millum muslimar í Birmingham. Her er Høgni við eini Bíbliu og Cicel við eini Koran*

um ganga í klæðum, har allur kroppurin er fjaldur, og bert eyguni síggjast. Í barnaskúlunum eru skelti o.a. skrivað á arábiskum. Gøturnar í býarpartinum eru trongar og óruddiligar við nógvari ferðslu í handilsgøtunum.

Vitjað var í eini mosku í Birmingham, ið er ein tann størsta í Norðurevropa. Vit vórðu væl móttikin av einum av leiðarunum, sum vísti okkum runt í moskuni og segði okkum frá um islamisku trúnna og svaraði spurningum.

Moskan rúmar umleið 5000 fólkum. Við inngongdina vóru vaskirúm til teirra, sum komu inn at biðja. Sambært islam skulu tey vaska sær um hendur, føtur, andlit, hár, oyru og nøs, áðrenn biðið verður.

Meðan vit vóru í moskuni komu nógv fólk inn og løgdu seg niður at biðja, meðan ein rødd læs upp bønirnar í hátalaranum.

Ferðalagið vitjaði eisini í einum Hindu-templi í býnum. Har var greitt frá tí grundleggjandi í hindulæruni. Ymiskar avgudamyndir vóru har, ið vit sóu, at fólk komu inn og tilbóðu.

## Samverkamenn

Samverkamenn er ein føroyskur missiónsfelagsskapur, ið hevur sum høvuðsendamál at boða gleðiboðskapin um Jesus Kristus - serliga millum muslimar, at upplýsa um tørvin á missiónsmarkini og at fáa onnur at fara til Asia við gleðiboðskapinum ella at arbeiða millum muslimar í Evropa. Eisini kunnar felagsskapurin um atsóknir, ið verða framdar móti kristnum - serliga í muslimskum londum.

Í løtuni arbeiða hjúnini Shamila, sum er úr Pakistan, og Høgni Johannesen úr Havn í Birmingham sum trúboðarar. Høgni arbeiðir meginpartin av tíðini saman við OM og er við í Samverkamonnum, samstundis sum hann lesur teologi. Í september flyta hjúnini Gvøðny og Janus Gunnarsson til Birmingham, har hann heldur fram við lestri sínum á Birmingham Christian College, og hon skal arbeiða á OM-miðstøðini. Hallur Mortensen úr Havn, sum eisini er við í Samverkamonnum, lesur teologi í Glasgow í Skotlandi.

Eftir ein spennandi og læruríkan túr í Birmingham møttu vit so í Stansted floghavnini í London sunnudagin 17. juli um 12-tíðina, tveir tímar áðrenn vit skuldu flúgva heim aftur til Føroya. Har fingu vit at vita, at vegna vánalig floglíkindi í Vágum var flogferðin útsett. Veðrið var gott, og restina av degnum nýttu vit í góðveðrinum uttan fyri floghavnina. Morgunin eftir eydnaðist at koma heim aftur í øllum góðum við einum flogfari, sum Atlantsflog hevði leigað.

Hetta var fyrstu ferð at Samverkamenn skipaði fyri einum slíkum túri við føroyskum luttakarum, men næsta ár er ætlanin aftur at fara við einum summarliði til Birmingham.

Heimasíðan hjá missiónsfelagsskapinum: www.samverkamenn.org



*Gamalt og nýtt møtast í miðbýnum í Birmingham. Ein gomul vøkur kirkja og risastóri nútímans Bullring-handilsbygningurin við rundum brikkum allan vegin runt*

## FAKTA

www.samverkamenn.org

**Tær fimm súlurnar í islamsku trúnni**
(Skyldurnar hjá øllum muslimum):
trúarjáttanin, bønin, føstan, pílgrímsferðin til Mekka, og at geva olmussu.

**Trúarjáttanin**
"Eg vitni at eingin gud er uttan Gud (Allah), og Mohammed er tænari hansara og boðberi"

**Bønin**
- Áðrenn muslimar biðja, skulu teir vaska sær um hendur, føtur, andlit, hár, oyru og nøs
- Teir kunnu biðja heima, men tað er størri heiður í at gera tað saman við øðrum
- Teir skulu biðja fimm ferðir um dagin
- Teir skulu liggja framyvir og á knæ og biðja
- Ávísar bønir skulu teir duga uttanat

**Fasta verður**
Í ein mánað um árið - ramadan-mánaðin - skulu teir hvørki eta ella drekka frá tí, at sólin rísur, til hon fer niður aftur

**Álmussa**
- Muslimar skulu geva 2,5 prosent av løn síni
- Teimum er álagt at geva til fátæk og líðandi muslimar
- Teir kunnu eisini geva sjálvboðnir

**Pílagrímsferðin**
Einaferð í lívinum skulu teir á pílagrímsferð til Mecca í Saudi Arabia

**Jihad**
Jihad verður roknað sum ein sætta súla av summum muslimum. Jihad verður eisini rópt fyri heilagt kríggj ella stríð - antin í orði ella verki.